## Panic og Pandurovic fara vestur



Serbarnir og miðvallarnir Jovan Radinovic Panic og Aco Pandurovic skulu í seinnu kappingarhálvu spæla við 07 Vestur. Tað váttar Eivin Jacobsen, nevndarformaður í felagnum. - Vit hava nú tríggjar serbar í hópinum. Og tað er í eini roynd at varðveita sætið í deildini, at vit velja hesa loysnina, sigur Eivin Jacobsen. Jovan Radinovic Panic hevur áður spælt við HB og 07 Vestur. Aco Pandurovic spældi í farna kappingarári við NSÍ. Framman undan er serbin Milan Pejcic í hópinum hjá 07 Vestur.

## HB eisini til Cypros

Tað verður eitt heitt summar hjá teimum báðum liðunum, sum í fjør vóru tey bæði bestu í føroysku kappingini, tí bæði tvey skulu tey til Kypros at spæla sínar europeisku dystir. Fyrr í morgun var greitt, at greipuvinnararnir úr EB/Streymi skulu spæla ímóti einum liði, sum eitur Apoel, og nú HB var síðsta føroyska felagið, ið var drigið í lutakastinum, gjørdist talan um felagið Omonia. Fulla navn felagsins er Athletic Club Omonia Nicosia, og er hetta tað felagið á Kypros, ið hevur flest viðhaldsfólk. Gjøgnum árini hevur Omonia vunnið 19 meistaraheiti, 12 steypaheiti og 14 sokallað Super Cup-heiti, so tað er kanska ikki so ólíkt HB, tá samanum kemur. HB kemur beinleiðis í annað umfar í UEFA Europe League-kappingini, og spælir fyrst á útivølli hósdagin 16. juli og síðani á heimavølli hósdagin 23. juli.

# Riddarin svaraði aftur



*Riddarin, sum mátti lúta á Fjarðastevnu, var nú aftur beint framman fyri Tvørabátin, men Sundabáturin hevur alt betri hug at arga teir báðar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sundabáturin tykist hava framgongd, men kappingin stendur framvegis millum Riddaran og Tvørabátin, har støðan nú er 2-1**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Riddarin, Tvørabáturin og Riddarin. Soleiðis hevur tað higartil í ár gingið í kappingini millum 6-mannafør við monnum. Riddarin vann á norðoyastevnu, Tvørabáturin vann á fjarðastevnu, og leygardagin var tað aftur Riddarin, sum var fyrstur á mál.

Tvørabáturin, sum vann á Skála, hevði ikki so góðan start á Kollafirði, men hann vann seg skjótt upp í aftur kappingina um oddasessin. Størstu kappingarneytarnir vóru vinnarin á norðoyastevnu, Riddarin, og Sundabáturin, sum stóð seg væl í fjør, men sum ikki hevur staðið seg so væl higartil í summar.

Sundabáturin hevði leingi hug at blanda seg uppí, men Riddarin fór spakuliga og støðugt frá avbjóðarunum, og tá ið tað restaðu hundrað metrar var leiðslan so mikið stór, at eingin ivi tóktist vera um, at Riddarin fór at vinna.

Riddarin vann, men hann fekk í endaspurtinum øgiliga kapping frá Tvørabátinum. Tá ið tveir teir fremstu bátarnir fóru um málið, var munurin so evarska lítil.

Úrslitið hjá Sundabátinum var merkisvert. Á norðoyastevnu varð Sundabáturin nummar átta. Á fjarðastevnu varð Sundabáturin nummar fýra. Á norðoyastevnu var fjarstøðan hjá Sundabátinum fram til oddasessin seytjan sekund. Á fjarðastevnu var fjarstøðan hjá Sundabátinum fram til oddasessin fimtan sekund. Leygardagin var fjarstøðan hjá Sundabátinum fram til oddasessin tódnað niður í knappliga fýra sekund!



*Jallurin var væl og virðiliga fremsti báturin, tá farið varð um málið í Kollafirði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Jallurin svaraði aftur

**Firvaldur, sum vann á fjarðastevnu, varð settur upp á pláss av tveimum bátum úr høvuðsstaðnum**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað varð greitt beinanvegin í góðveðrinum í Kollafirði leygardagin, at tað fór ikki at verða sama úrtøka hjá teimum á Tvøroyri í kappróðrinum leygardagin, sum tað var, tá ið tað varð kappast á Skála.

Á Skála var Firvaldur av Tvøroyri greiður vinnari, men hesa ferð gekk tað soleiðis, sum tað gjørdi í Klaksvík:

Jallurin hjá Róðrarfelagnum Knørri legði bragdliga fyri. Fyrstu litlu løtuna fylgdi Firvaldur við, men so mistu tær av Tvøroyri, meðan Sílið hjá Havnar Róðrarfelag blandaði seg uppí og eina løtu kappaðist við Jallin um fremsta plássið.

Í endaspurtinum var tó eingin ivi. Jallur, sum eisini vann á norðoyastevnu, varð sannførandi vinnari – eina bátslongd frammanfyri Sílið og knappliga tvær bátslongdir fyrr á mál enn Firvaldur.

At Sílið, sum á norðoyastevnu endaði á fimta plássi, og sum á fjarðastevnu var nummar fýra, hesa ferð varð nummar tvey, og at Firvaldur hesa ferð varð trýstur aftur á triðja pláss, ber við sær, at Jallurin nú er tvey stig frammanfyri Firvald í FM kappingini.

# Argja kappingin eitt sindur tættari

**Fjarstøðan millum tveir teir fremstu var hesa ferð minni enn helmingin av tí, sum hon var næstsíðst**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tað er óneyðugt at endurtaka, at talan er ikki um kapping um FM heitið.

Argjabáturin hevur higartil vunnið allar róðrarnar, og okkurt heilt merkisvert skal koma fyri, um Argjabáturin ikki fer at vinna allar sjey FM róðrarnar.

Eftir fjarðastevnuna varð nevnt, at argjamenn – umframt Argjabátin – eisini høvdu mannað Árnfirðing. Á Skála gingu tað nítjan sekund frá tí, at Argjabáturin fór um málið, og inntil Árnfirðingur kom á mál.

Í Kollafirði var munurin tódnaður niður í níggju sekund. At Árnfirðingur rættiliga skal bjóða av í kappingini um fremsta plássið tykist óhugsandi, og undir øllum umstøðum fer eingin sigur heim um ánna. Ørvur og Knørrur eru við, men teir eru ikki við í kappingini um fremsta plássið.



*Argjabáturin var enn einaferð fullkomuliga einaráðandi í áttamannafarsróðrinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*